FALDARI 4

# 2016 H71 2017

## HEIMA Í HOYVÍK



FTZ DEILDIN

# H71 v NEISTIN

**HOYVÍKSHØLLIN** SUNNUDAGIN **13. NOVEMBER** 2016 **KL.16.00**


Auto Service
BÓNUS er biligari!
J&K
TRYGD
INTERSPORT Thomas Dam ítróttur
ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
LAIDERZ
SUÐUROYAR SPARIKASSI

# STRÍÐAST

## HEIMLIGI HONDBÓLTURIN Í FREMSTU DEILDINI HEVUR HAFT STEÐG SEINASTA VIKUSKIFTIÐ, TÍ A-LANDSLIÐ OKKARA HEVUR LUTTIKIÐ Í ALTJÓÐA VENJINGARKAPPING UTTANLANDS, SUM LIÐUR Í FYRIREIKINGUNUM TIL EM UNDANKAPPING 2020

Leikt var ímóti B-liðunum hjá Danmark og Póllandi og ímóti fremsta landsliðnum hjá Estlandi. Føroyar taptu allar dystirnar, tepurt ímóti Estlandi og Póllandi, men heldur størri ímóti Danmark. Sum skilst, eru landsliðsvenjararnir nøgdir við tað, ið spurdist burturúr. So er bert at vóna, at henda luttøka kann vera enn ein klípa, ið tí landsliðsvarða arbeitt nú hevur verið við at laða seinastu árini, í eini roynd at endurvinna tað støðu hjá hondbóltslandsliði okkara sum tað hevði í 70 – unum. Eitt er í øllum førum vist, at neyðugt er at hava eitt gott og sterkt landslið, fyri at fáa evnaríku leikarum okkara at støðast í heimliðum umhvørvi, heldur enn at leita aðrar vegir.

Eitt er landslið, annað okkara heimliga H71. Har kunnu avbjóðingarnar í ávísan mun samanberast við tær landsliðið hevur. Vit mugu í Hoyvík hava so góðar og tryggar karmar um felag okkara og virksemi tess, so tryggjast kann, at leikarar okkara kunnu fáa uppfylt ambitiónir sínar innan hondbólt. Arbeitt hevur verið miðvíst í nógv harrans ár við at skapa hesar karmar og meti eg sjálvur, at vit eru á rættari leið. Hava nú (at kalla) egna ítróttarhøll, felagshølir og styrkivenjingarrúm. Skipa venjing við skikkaðum venjarum og vegleiðarum, eru til allar deildir og aldursbólkar og nógv onnur fólk eru um felagið, at uppfylla allar tær mongu funktiónir, virksemið í slíkum felagi krevur. Men sum eitt tað mest týdningarmikla, hava vit í hondbóltsumhvørvi okkara í Hoyvík skapað ein egna samleika, ið leikarar okkara kunnu identifisera seg við, tá teir fara í svarta leikbúnan, at stríðast fyri felagið.

Nú vit tosa um, at stríðast, so er tað júst tað, ið skal vera lyklaorðið til dystirnar, ið standa fyri durum. Fyrst ímóti KÍF mikukvøldið 9. nov. og síðani ímóti Neistanum sunnudagin 13. nov. Í fyrsta leikumfari taptu vit greitt ímóti hesum liðum, 23 – 26 ímóti Neistanum og 23 – 29 ímóti KÍF. Fyri mær var tað eingin ivi í, at hesi tap júst skyldaðust manglandi stríðsvilja. Onkursvegna kendist sum at vit ongantíð rættuliga komu inn í hesar dystir, stóðu bert og bíðaðu og eins og søgdu, at hetta skuldi nokk ganga. Men tað ger tað bara ikki. Einki gongur nokk. Altíð skal stríðast og berjast fyri sigri. Eingin kemur sovandi til nakað í hondbólti, heldur ikki H71. Og vónandi hava vit lært av hesum avsmurningum og venda hetta til ein hugsavnaðan og skipaðan innsats í komandi dystunum. Gera vit tað, so er eingin ivi í, at vit kunnu standa okkum betur ímóti Neistanum og KÍF nú í øðrum leikumfari.



**Anna Dam**
forkvinna,
tel. 519082


**Bergtóra Høgnadóttir**
næstforkv., tel. 286011


**Ann-Mari B. Mouritsen**
tel. 214452


**Emy Sólvitsdóttir**
tel. 513769


**René Dahl Olesen**
tel. 235930


**Janet Fríða Johannesen**
tel. 212211


**Símun Poulsen**
tel. 517220


**Erland Jensen**
tel. 243534


**Hondbóltsfelagið H71**, Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067, FO-188 Hoyvík, www.h71.fo **FALDARI 3 2016-17**

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

**Ábyrgd av faldara:** Bergtóra Høgnadóttir
**Snið, umbróting og prent:** Føroyaprent


NordikSOLO 18+
Við NordikSOLO ert tú flúgvandi
BANKNORDIK
Niður at lesa? Ella hevur babba bara blakað teg úr reiðrinum? Tú hevur brúk fyri NordikSolo! Tú fært kort, avsláttur, ókeypis ditt og datt og onkran at sparra við, tá tú ivast. Um tú ert í Føroyum, Keypmannahavn, Aarhus, Nuuk ella í Odense, tað er eitt feitt. BankNordik er har, tá tú fert Solo.
www.banknordik.fo/utisetar
* NordikSolo gevur tær hvørki, veingir, lasaraeygu ella „størri pakka“.
SENDISTOVAN

# GÓÐA HELENA!

**TÁ IÐ EG NÚ SKRIVI HESAR REGLUR TIL TÍN, SO ER TAÐ TÍ, AT TÚ NÚ EFTIR MONG HARRANS ÁR – BÆÐI SUM LIMUR OG SEINASTU NÓGVU ÁRINI SUM FORMAÐUR Í STUÐLAFELAGNUM HJÁ H71 – HEVUR TIKIÐ AVGERÐ UM AT LEGGJA FRÁ TÆR**



Skeiðið er nú runnið, hjartamálið rokkið og gleðin av einum valaverkið stendur alljós, so nú er tíðin komin til at fjálgar hendur sleppa og aðrar taka við.

Áhaldandi parturin hjá tær og Kurt, altíð til verka fús – ungdóminum at frama – kemur at standa ritaður sum rúnir í søgu felagsins í mong komandi ár – onkur vildi kanska sagt, at tit eru LEGENDIR.

Í fleiri enn 20 ár hevur tú myndað Stuðlafelagið saman við nógvum øðrum góðum fólkum. Stuðulsfelagið hevur havt ovurstóran týdning fyri trivnaðin í Hoyvík og hevur lagt lunnar undir tað megnar ítróttarfelag, sum H71 hevur ment seg til. Hetta góvu vit okkum neyvan far um, tá vit, eitt vetrarkvøld møttust fleiri á loftinum á Café Natúr til stovnanina – eg sum formaður í H71 og tú sum ein eldsál, við eittans endamáli: At fjálga um ungdómin í Hoyvík. Og við at seta nærlagdar og góðar ungdómsvenjarar til allar aldursbólkar sum eitt miðvíst mál, vart tú við til at leggja tann botn, sum hevur skapt so nógv fyri so mong í Hoyvík.



Frá mær og forkvinnuni í H71 skal ljóða ein hjartans tøkk til tín og Kurt fyri tykkara stillisliga og eyðmjúka íkast til felagsskapin, ið kemur at standa sum ein varði á vegnum hjá øllum øðrum, sum velja at ganga sama hjálpar- og ósjálvsøkna veg sum tit.

*Vinarliga*
***Ein aldrandi formaður í H71***


XL BYG®
TÓRSHAVN
DEWALT
TIMBURHANDIL - BYGGIMARKNAÐUR
og nú eisini
XL BYG®
HANDVERKARABÚÐ
Opið
Mán - frí 08.00 - 17.00
Leygard. 09.00 - 13.00


Lundin Financials
Lundin Løn
Microsoft Dynamics
Trygg
fíggjarstýring
nema
SENDISTOVAN

VANILJU
KREM
Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
lekkiliga vaniljukrem.
Nýggj vøra!
MBM
SENDISTOVAN

javni

Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 20 80 90
javni@javni.fo
www.javni.fo

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98
www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

P/F **Hjá Fróða**

Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo

Flügger

**Kaj Andreasen & Co**

Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum



TIT HAVA TØRVIN
VIT ERU VEITARIN.

Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum.

Atlas Copco Quality

Atlas Copco




LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO


Dekk
- sjálvandi frá Bilrøkt!
- Vit selja øll sløg og allar støddir
- Vetrardekk á sportsfelgum
- Vit hava helst besta prísin
- Góð tænasta og góðir prísir
- Bil or not to bil
Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00 - 17.00
og leygardagar frá 10.00 - 13.00
bilrokt.fo
Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · Tel: 358880 · Mobil: 235880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo


LEASA MEG
PRIVAT LEASING FRÁ REYNI SERVICE
TOYOTA
3
ÁRA SERVICE PAKKI
YARIS HYBRID
YARIS HYBRID
Einans 3.640,- um mánaðin!
TØRVAR IKKI LØÐING
Við Yaris all in fært tú alt við: Tá er eisini trygging, vektgjald og dekk íroknað. Allir prísir eru við mvg. Eitt stovningargjald á 20.000 kr., eitt fast mánaðargjald og nýggjan bil 3. hvørt ár. Og vit taka okkum av øllum viðlíkahaldi. Sí treytir á reyniservice.fo
REYNI SERVICE
Umhvørvisviðurkent ISO 14001 virki

vistir.fo
haraldsen



trygging.fo



# Tryggja **teg** og **tíni kæru**

Tað er týdningarmikið at tryggja teg og tíni kæru, um tú skuldi verið fyri vanlukku ella sjúku.





Ein **vanlukkutrygging** fevnir um flestar vanlukkur, skaðar og óhapp, sum tú kanst koma út fyri. Til dømis dekkar hon ymisk sløg av tannskaðum og øðrum likamsskaðum, men tilburðurin skal vera íkomin í samband við ein vanlukkutilburð.

**Viðgerðartrygging** er góð og er galdandi alt samdøgrið, bæði tá ið tú ert til arbeiðis og tá ið tú hevur frí. Hon fevnir um pínu, sjúku og fylgjur av vanlukkum, sum krevja viðgerð av serlækna. Hon tryggjar tær viðgerð innan 10 dagar, soleiðis at tú sleppur undan bíðilistum.

**Set teg í samband við okkum og hoyr meira um hesar og aðrar tryggingar.**

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR




# Ætlar tú at selja tíni hús í Hoyvík ?

## - vit hava keyparar, ið bíða

Niels F[illegible]a 37 | Tórshavn | Tel 348 900 | inni@inni.fo | inni.fo

INNI

# H71 KLÆÐINI 2016/17



## Sweat
Børn: 399-
Vaksin: 449,-

## Jacket
Børn: 449,-
Vaksin: 499,-

## Pants
Børn: 399,-
Vaksin: 449,-

H71 INTERSPORT Thomas Dam ítróttur adidas

HILMAR JAN HANSEN:

# HERI STÓRAN DANSKAN HEIÐUR

**HERI ZISKA, IÐ ANNAÐ ÁRIÐ Á RAÐ TEKUR SÆR AV KROPSLIGU VENJINGINI HJÁ OKKARA SPÆLARUM, ER BLIVIN HEIÐRAÐUR Í DANMARK SUM SLÓÐARI OG UNDANGONGUMAÐUR**

Síðani síðsta heimadyst hjá H71 hevur ein av okkara góðu venjarum fingið stóran heiður. Tað er fysiski venjarin hjá mansliðnum, Heri Ziska, sum hevur fingið heiðurin sum Ársins Leiðari hjá danska atletikksambandinum. Fyrst kundu øll atkvøða á netinum og síðani kundu tey greiða sms-atkvøðu, sum vóru til staðar til DAF Awards, og taldi hvør atkvøðugreiðslan 50 prosent.

Endin var, at Heri Ziska stóð eftir sum vinnari av hesum serliga heiðuri, og hann fekk millum annað tað skoðsmál, at »hann er ágrýtin, eyðmjúkur og fyrikomandi, við eini góðari venjingarfilosofi um at gera tey ungu góð, men at lata tað taka ta tíð, sum tað tekur.

– Tá eg bleiv innstillaður, bleiv eg rættiliga bilsin – ikki minst, tí eg var innstillaður sum leiðari, hóast eg væl veit av, at tað eisini er ein leiðaraleiklutur at vera venjari. Men sum eg havi skilt tað, er hesin heiður fallin mær í lut, tí eg onkursvegna havi dugað at fingið tey at blivið við, sum eg havi havt um hendi, sigur Heri, ið heldur, at hansara leiðaraleiklutur kanska meira er sum ein mentor, har hann leiðir tann einstaka, heldur enn fjøldina.

Sjálvur dylur hann ikki fyri, at hann tekur heiðurin sum eitt ordans herðaklapp, og vit í H71 samgleðast sjálvandi við Hera og eru fegin um, at ein av okkara fær ein so stóran heiður, tí vit hava eisini sæð, hvussu væl tað hevur hepnast hjá honum her í felagnum.



## NÝTT FYRI MEG

Heri Ziska hevur í mong ár verið eitt av kendu nøvnunum á føroyska ítróttarpallinum, og ikki minst man hann vera ein hin drúgvasta fyrimyndin fyri ungfólk, ið droyma um glæsilig úrslit í altjóða kappingum, so sum Oyggjaleikum og øðrum, tí Heri hevur altso roynt tað mesta, sum er vert at royna.

Hann hevur vunnið gull í klingruvarpi á Oyggjaleikum í bæði 1999 og 2003, umframt bronsu í 2013, sum var hansara fjúrtanda heiðursmerki í røðini har, og hartil hevur hann sett føroysk met í hópatali, vunnið DM-silvur og mangt annað aftrat.

***...framhald á síðu 16***

AnniJanni

# FOKUS 18:29

## Lætt og stuttligt



Gjaldskort
Fígging
FramtíðarKonta

ss.fo

SUÐUROYAR SPARIKASSI





– Tá boð vóru eftir mær frá H71 at koma at taka mær av kropsligu venjingini hjá monnunum, mátti eg fyrst hugsa meg um fyri at vita, hvat eg hevði at bjóða, tí hondbóltur var ein nýggjur ítróttur fyri meg, so eg mátti líka vita, hvat eg kundi læra frá mær. So var tað sjálvandi eisini ein spurningur, um eg hevði stundir til tað, tí hugurin var har mestsum beinanvegin, sigur 49 ára gamli venjarin.

– Tað var tó lætt at koma í gongd, tí eg fekk góða hjálp frá Peturi og Halgiri, so eg kundi gera mær eina mynd av, hvat teirra spælarar skuldu duga og kunna. Eg byrjaði jú heldur ikki á berum, tí hetta vóru menn, sum longu høvdu vant nógv og sum heild vóru í góðari venjing. Her snúði tað seg meira um at byggja upp á tað, sum var har frammanundan.

## BETRI AV AT LÆRA

Heri heldur flennandi fyri, at um frælsur ítróttur verður kókaður niður í tað heilt basala, so snýr tað seg um at læra at renna, leypa og kasta – og tað er í prinsippinum eisini tað einfalda grundarlagið, sum ein góður hondbóltsspælari hevur at byggja á, áðrenn annar teknikkur og taktikkur kemur uppí.

– Av tí at frælsur ítróttur eru tey grundleggjandi elementini, ið ganga aftur í nógvum øðrum ítrótti, ber væl til at bera júst alt tað úr frælsum ítrótti víðari til aðrar ítróttargreinar, sum í hesum føri hondbólt, sigur Heri Ziska.

– Eg havi sjálvandi okkurt við til hondbóltin, men tað styrkir bara mínar førleikar, at eg eisini veit, hvat onnur gera, tí hóast tað eru nógv ting í hondbólti, sum kanska ikki beinleiðis eru viðkomandi fyri tað, eg annars takist við, ger tað meg til ein betri venjara, at eg kann læra av hondbóltinum eisini.

Sum venjari var hann at byrja við sjálvlærdur, tí hann byrjaði bara at venja, men Heri Ziska roynir í dag at sleppa fram at øllum teimum skeiðum, hann kann, tí hann gongur høgt uppí at førleikamenna seg alla tíðina. Tað er bara ikki altíð so lætt, tá tú býrt í Føroyum, tí tá skal altíð leggjast uppfyri frástøðuni og ferðingini.

– Sum venjari á hesum økinum eri eg sjálvandi eisini nokk so einsamallur í Føroyum, men hinvegin havi eg eitt net av venjarum í eitt nú Danmark og Svøríki, sum eg samstarvi við og kann tosa við um teknisk element í venjingini og annað, sigur Heri, sum hevur tikið upp til diplomvenjaraútbúgving hjá danska ítróttarsambandinum, umframt at hann eisini er instruktørur hjá svenska atletikksambandinum, ið føroyingar somuleiðis hava samstarvað nógv við.

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**



Vit hava deilt vinningin millum
allar kundar okkara í 50 ár
– og tí halda vit fram við

Kopargøta 1, Tórshavn | www.liv.fo

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

SENDISTOVAN

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI



# Góðir starvsfelagar skapa góð úrslit

“Eg eri vísur í, at tað er góði starvsandin, sum skapar góðu úrslitini hjá Marine Harvest”

*Fjalar, alari í Oyndarfirði*

Marine Harvest strembar eftir at skapa bestu liviumstøður fyri laksin. Vit tryggja okkum, at laksurin er heilsugóður matur. Vit arbeiða í góðum samljóði við umhvørvið og við ábyrgd fyri samfelagnum. Marine Harvest vil vísa vegin til alsamt størri burðardygd.

LAIDERZ

*Better in the long run*







VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI

Alt til *HITA*
*SANITET &*
*VENTILATIÓN*

**Maria Poulsen & Co**

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000








...bert hugflogið
setur mørk!

OKKARA NÝGGJA SKERIMASKINA

# HUGSA STÓRT

Við nýggju skerimaskinu okkara kunnu vit nú bjóða hesa slóðbrótandi framleiðslu í Føroyum.
Útskorin skelti, stavir, samansetingar og standarar úr flest øllum tilfari og tjúgdum.

**Ja, nú ber veruliga ALT til – Hugsa stórt, hugsa Føroyaprent!**

Ring tel. 314555 og hoyr nærri
www.foroyaprent.fo

Føroyaprent

www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA




Ung í Eik
www.eik.fo/ung
Tel. 348000

Eik

# ALTJÓÐA HONDBÓLTUR Í FØROYUM

**SO HVØRT SUM FØROYSKA LANDSLIÐSVIRKSEMI Í HONDBÓLTI SEINASTU ÁRINI ER ØKT HAVA NÝGGJAR HURÐAR LATIÐ SEG UPP, OG FRÁ LÍTLUM OG ONGUM VIRKSEMI, ERU NÚ ØLL LANDSLIÐINI STØÐUGT OG FRAMHALDANDI VIRKIN**



Komandi tíðina skulu Føroyar hýsa fleiri altjóða hondbóltskappingum, og tað er ein veruligur varði á leiðini at vinna Føroyum pláss í millum fremstu hondbóltstjóðirnar í Evropa.

Við neyðugum hepni í lutakøstum og samráðingum hevur eydnast okkum, at fáa dystirnar í trimum undankappingarbólkunum, har Føroyar eru við, heim til Føroya. Hesar kappingar vera nú um ársskiftið.

- **Undankapping til HM 2017** fyri A-landslið hjá kvinnum (2-4. des 2016)
- **Undankapping til HM 2017** fyri U21 landslið hjá monnum (6-8. jan 2017)
- **Undankapping til EM 2020 Q1** fyri A-landslið hjá monnum (13-15. jan 2017)

## KVINNURNAR Í BÓLKI VIÐ MAKEDONIA, EYSTURRÍKI OG ÍSLAND

Fyrst eru tað kvinnurnar, sum fyrsta vikuskifti í desembur spæla undankapping til HM í Føroyum. Vit eru í bólki 3, saman við Makedonia, Íslandi og Eysturríki.



*...framhald á síðu 28*



# HIN ELEKTRISKI STÓLURIN



## PAULI MITTÚN

D16
(14 ÁR)

**Hvørjum plássi spælur tú á?**
Vinstri bakkur

**Hvat er tað flottasta málið, ið tú hevur skorað í einum dysti?**
Ein skrúvara ímóti Flensburg, tá vit vóru við landsliðnum í Týsklandi

**Hvør er tín stórsta hondbóltsfyrimynd?**
Petur Mittún

**Hevur tú nøkur ritualir áðrenn dyst?**
Eti altíð 5 breyðstykkir áðrenn dyst

**Hvat er tann besti sangurin at lurta eftir áðrenn dyst?**
Thunderstruck

**Hvat er tín besta hondbóltsuppliving?**
Vinna á Flensburg

**Hvør er besti leikari, ið tú hevur spælt ímóti?**
Bjarni Magnusarson

**Hvat fyri skoritriks hevur riggað best hjá tær?**
Hallow góða

**Hevur tú nakra flóvisliga hondbóltssøgu at fortelja?**
Tá Hjarnar gav dómaranum fingurin í Partille Cup og fekk reyða

**Hvat ger H71 til besta hondbóltsfelag í Føroyum?**
Samanhaldið og teir góðu venjararnir

**Hvønn skal eg spyrja næst?**
Sakir Tróndarson Frýdal


HANDLA
Ein heimur fyri seg av tilfari til skapandi sálir
01
GLOSSY
www.handla.fo




Hetta er næsta stóra uppgávan hjá kvinnulandsliðnum, eftir at liðið í juni 2015 spældi EM undankapping. Komandi summar er so ætlanin, at liðið aftur skal spæla EM undankapping.






Liðið fer í samband við fyrireikingarnar til HM dystirnar til Danmarkar á venjingarlegu í Århus dagarnar 21. – 24. novembur. Vit eru tíðliga í menningini av kvinnulandsliðnum, og miðalaldurin er rættiliga lágur, so kappingin í Føroyum verður ivaleyst ein góð og mennandi avbjóðing. Tvey lið fara víðari til playoff dystir um at koma til HM kappingina, sum verður í Týsklandi í desembur 2017.

Venjarar hjá føroysku kvinnunum eru Andreas F. Hansen og Scott Harrington.

***...framhald á síðu 37***

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

SENDISTOVAN


Bilasolan.fo
Nýggi Audi A3 Sportback
Langt á odda.
Audi
Vorsprung durch Technik
Bilasølan
Vegurin langi, 359700

Altíð okkurt
sunt og gott
www.fast.fo
fast:


SEX
KREVUR
SAMTYKKI!




NORÐOYA SPARIKASSI

Orkulán 2,5%

- Bústaðarlán við lágari rentu

**Bílegg eitt kundaprát**
*og fá meira at vita um fyrimunirnar við orkulánunum*



Norðoya Sparikassi - Hoyvíksvegur 67 - FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 - ns@ns.fo - www.ns.fo

Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

# Hesin er við í prísinum í trý ár..!

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**



*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*



Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Auto Service
www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum
skatti

Afturrindan
av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar

FAROE SHIP

BYGMA
BALSLEV

Stuðlar ítróttini

SAMSKIP
Saman røkka vit málinum

yviri við Strond 23 – Postbox 3255 – Tel. 30 88 00 – Fax. 30 88 01 – www.samskip.com



## U21 LANDSLIÐIÐ VIÐ MONNUM Á HEIMAVØLLI MÓTI SVEIS, ÍSRAEL OG FINNLANDI

Fyrst í komandi ári skal U21-manslandsliðið (1996 og 97) í eldin. Liðið er við í HM undankappingina, í bólki 7, saman við Sveis, Ísrael og Finnlandi. Bólkurin verður avgreiddur í Føroyum dagarnar 6. – 8. januar 2017. Eitt lið fer víðari til sjálvt HM endaspælið, sum verður á sumri 2017 í Algeria.

Væntað verður, at Føroyar hava góðar møguleikar móti Finnlandi og Ísrael, meðan Sveis, sum er styrkimett millum 10 tey fremstu í Evropa, verður truplari.

Venjarar hjá U21-liðnum eru Kári Nielsen og Ingi Olsen.

## MANSLANDSLIÐIÐ Í BÓLKI VIÐ GRIKKALANDI OG KYPROS

Manslandsliðið, sum í fjør vann Emerging Nations Cup í Kosovu, skal í 13. - 15. januar 2017 á heimavølli spæla EM undankapping, stig 1. Føroyar eru í bólki A, saman við Grikkalandi og Kýpros. Vinnarin av bólkinum fer víðari til stig 2, sum er veruliga undankappingin, sum verður spæld í átta bólkum á fýra lið á heysti í 2018 og á vári 2019.

Nr. tvey og trý í kappingini fáa enn ein møguleika at spæla seg víðari, umvegis Emerging Nations Champiosnhip, sum verður í juli 2017. Har fer vinnarin eisini sleppur víðari til stig 2.

Mett verður, at Føroyar kunnu spæla upp móti bæði Grikkalandi og Kypros, so spennandi verður at síggja hvønn veg tað fer.

Landsliðsvenjarar eru Kári Nielsen og Birgir Hansen.

## H71

1 Ári E. **Dam**
16 Jens **á Skipagøtu**

4 Rúni Vest **Højgaard**
5 Bogi **Gaard Davidsen**
6 Rasmus **Rosendahl**
8 Pætur **Thomsen**
10 Vilhelm **Poulsen**
11 Hans Kári **Hansen**
14 Sigmundur **H. Dahl**
15 Sigmundur **Nolsøe**
18 Andor **Sivertsen**
22 Helgi **Hoydal**
23 Hilmar Leon **Jakobsen**
24 Niklas **Højgaard Hanusson**
45 Peter **Krogh**
73 Dánjal **Tórgarð**
89 Jónas **G. Djurhuus**
99 Tróndur **Arge**

**Venjari:** Sonni D. V. Larsen
**Hjálparvenjari:** Mark Lausen-Marcher
**Málmansvenjari:** Jens á Skipagøtu
**Styrkivenjari:** Heri Ziska
**Liðleiðari:** Petur Sivertsen
**Fysioterapeutur:** Bartal Dahl Andreassen

## NEISTIN

12 Eliesar **Rubeksen**
16 Nicolas **Satchwell**

2 John **í Innistovu**
6 Rasmus **Müller**
7 Andras **Joensen**
9 Rói **Berg Hansen**
11 Herbjørn **Ludvig**
15 Torstein **Balle**
17 Pætur **Mikkjalson**
18 Christopher **Moe**
20 Hjalti **í Jákupstovu**
21 Jónsvein **Dulavík**
24 Terji **Mørk**
29 Torkil **Hentze**
55 Frank **Askildsen**
79 Teis **Horn**

**Venjari:** Scott Harrington
**Hjálparvenjari:** Ári Roach
**Liðleiðari:** Julian Lava

## Dystaryvirlit hjá H71 í FTZ-deildini:

| | | |
|---|---|---|
| 18.09.2016 | **H71** - Team Klaksvík | **36**-19 |
| 21.09.2016 | StÍF - **H71** | 23-**36** |
| 25.09.2016 | **H71** - Kyndil | **26**-19 |
| 06.10.2016 | Neistin - **H71** | 26-**23** |
| 08.10.2016 | KÍF - **H71** | 29-**23** |
| 16.10.2016 | **H71** - VÍF | **28**-17 |
| 23.10.2016 | Kyndil - H71 | 21-**29** |
| 26.10.2016 | Team Klaksvík - **H71** | 22-**29** |
| 30.10.2016 | **H71** - StÍF | **25**-25 |
| 09.11.2016 | **H71** - KÍF | - |
| 13.11.2016 | **H71** - Neistin | - |
| 27.11.2016 | **H71** - Kyndil | - |
| 11.12.2016 | VÍF - **H71** | - |
| 14.12.2016 | **H71** - Team Klaksvík | - |
| 17.12.2016 | StÍF - **H71** | - |
| 26.02.2017 | **H71** - KÍF | - |
| 01.03.2017 | VÍF - **H71** | - |
| 08.03.2017 | Team Klaksvík - **H71** | - |
| 12.03.2017 | **H71** - StÍF | - |
| 19.03.2017 | **H71** - Neistin | - |
| 25.03.2017 | Kyndil - **H71** | - |
| 01.04.2017 | Neistin - **H71** | - |
| 09.04.2017 | **H71** - VÍF | - |
| 15.04.2017 | KÍF - **H71** | - |

## Støðan í FTZ-deildini:

| Nr. | Lið | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1** | **H71** | **9** | **255** | **201** | **54** | **13** |
| 2 | VÍF | 9 | 265 | 222 | 43 | 12 |
| 3 | KÍF | 7 | 184 | 179 | 5 | 10 |
| 4 | Kyndil | 9 | 229 | 228 | 1 | 10 |
| 5 | Neistin | 8 | 208 | 214 | -6 | 8 |
| 6 | StÍF | 9 | 243 | 249 | -6 | 6 |
| 7 | Team Klaksvík | 9 | 190 | 281 | -91 | 1 |

# ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!



## J & K Betong

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25

# »GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



## ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · JULIANNA KLETT